# Endiliga kom summarið…

**Sól og summar eyðkendi Havnina hósdagin. Sólin bakaði oman og niðan, og niðri í Sandágerði sá tað út, sum sandurin var ein onnur Copacabana í Suðurameríka**

SUMMAR
*Ingrid Bjarnastein*

**Sandágerði:** Summarið í ár hevur verið lýtt, men óvanliga keðiligt við gráum veðrið og mjørka. Fleiri, sum eru komin heim í summarfrítíðini hava gramt seg um, at tey als ikki hava sæð himmalin, síðani tey eru komin heim á klettarnar.

Men longu mikudagin byrjaði veðrið at skifta. Tað bendi á, at nú var liðugt við mjørka og skýggjum, og sólin byrjaði at kaga fram undan skýggjunum. Og hósdagin kom summarveðrið.

Sólin bakaði oman og niðan kring alt landið, og á teimum ymsu sandunum var fult av fólki.

Í Sandágerði var fult av fólki hósdagin. Gummibátar og onnur svimjiútgerð varð funnin fram, og fólk í øllum aldri lógu á sandinum og nutu tað góða veðrið.

Veðrið fríggjadagin var tó ikki nógv at reypa av. Ikki í Havnini í øllum førum, tí tá var mjørkin so tjúkkur, at lítið og onki sást aftur.



*Í Sandágerði hugnaðu tey mongu fólkini sær ófført í góðveðrinum hósdagin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av landsynningi og væntandi turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 16 og 19 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Fleyr til gul av landsynningi og regn ella mjørki av og á. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Fleyr til gul av landsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 15 og 18 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Fleyr til gul av landsynningi, seinni av ymsum ættum og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 11 og 15 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 8 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 12 |
| Saint John's | 23 |
| Halifax | 18 |
| Reykjavík | 16 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 16 |
| Lerwick | 19 |
| Aberdeen | 19 |
| London | 16 |
| Tromsø | 13 |
| Bergen | 28 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 27 |
| Keypmannah. | 20 |
| Helsinki | 25 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 25 |
| Warzawa | 29 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 21 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 31 |
| Malorca | 32 |
| Athen | 31 |
| Malta | 38 |
| Tunis | 35 |
| Beijing | 29 |
| New Dehli | 28 |
| Bangkok | 34 |
| Jakarta | -- |
| Sydney | 15 |
| New York | 26 |
| Miami | 29 |
| Los Angeles | 28 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 31 |
| La Paz | 8 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 15 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1008 hPa. vestan fyri Skotland grynnist, men brúgvalagið haðani kemur móti Føroyum. Eitt hátrýst, 1024 hPa. yvir Norska Havinum viknar.




**Í dag:**
Lágtrýstið við Írland stendur mestsum í stað, men brúgvalagið haðani til Skotlands verður yvir Føroyum sunnudagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 17/07 kl. 06[00]–18/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 14,2°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 22,1°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,6 mm –mált frá 17/07 kl. 06[00]–18/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 48,7 mm









## VESTFALLSKYRRINDI

10. juli: Mánin næstur jørðini
13. juli: Full sól
21. juli: Seinna kvarter
22. juli: Mánin longst frá jørðini
29. juli: Tendring

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 19. juli | 11.54 | — | 10.54 | 23.15 | 11.09 | 23.30 | 01.34 | 13.54 | 02.34 | 14.54 | 10.09 | 22.30 | 09.09 | 21.30 | — | 12.09 | 00.49 | 13.09 | 11.39 | — | 00.34 | 12.54 |
| 20. juli | 00.15 | 12.37 | 11.37 | — | 11.52 | — | 02.15 | 14.37 | 03.15 | 15.37 | 10.52 | 23.23 | 09.52 | 22.23 | 00.30 | 12.52 | 01.30 | 13.52 | 00.00 | 12.22 | 01.15 | 13.37 |
| 21. juli | 01.08 | 13.40 | 00.08 | 12.40 | 00.23 | 12.55 | 03.08 | 15.40 | 04.08 | 16.40 | 11.55 | — | 10.55 | 23.29 | 01.23 | 13.55 | 02.23 | 14.55 | 00.53 | 13.25 | 02.08 | 14.40 |
| 22. juli | 02.14 | 14.49 | 01.14 | 13.49 | 01.29 | 14.04 | 04.14 | 16.49 | 05.14 | 17.49 | 00.29 | 13.04 | — | 12.04 | 02.29 | 15.04 | 03.29 | 16.04 | 01.59 | 14.34 | 03.14 | 15.49 |
| 23. juli | 03.08 | 15.27 | 02.08 | 14.27 | 02.23 | 14.42 | 05.08 | 17.27 | 06.08 | 18.27 | 01.23 | 13.42 | 00.23 | 12.42 | 03.23 | 15.42 | 04.23 | 16.42 | 02.53 | 15.12 | 04.08 | 16.27 |

5 707265 100067 >